# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Føðingar



*30. september fingu Anna-Maria og Herluf Gudmundarson, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3800 gr. Stórubeiggjarnir eita Rúni og Fríði.*

21. september fingu Magna Dania og Sørin Ragnar Joensen, Kunoy, ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 3450 gr.

28. september fingu Rannvá Rasmussen og Gert Langgaard, Saltangará ein son. Hann var 39 cm langur og vigaði 1350 gr.

29. september fingu Gunnrið Jóanesarson og Mortan Simosen, Argjum, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 4100 gr.

30. september fingu Irdi Debes og Sjúrður Johansen, Hoyvík, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3600 gr.

30. september fingu Birna Henriksen og Jákup Haraldsen, Sørvági, eina dóttur. Hon var 45 cm long og vigaði 1950 gr.

2. oktober fingu Anne Mette Schubart og Johan Christian Ziska Nielsen, Tórshavn, ein son. Hann var 57 cm langur og vigaði 4470 gr.

2. oktober fingu Herborg á Mýrini, Sandavági, og Poul Poulsen, Hvalba, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 4000 gr. Stóri beiggin eitur Árant.

3. oktober fingu Óluva Poulsen og Ólavur Rasmussen, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 4000 gr.

3. oktober fingu Katrin og Allan Mortensen, Argjum, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3600 gr.

5. oktober fingu Feng Dai og Sigurd Jørgensen, Sørvági, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4250 gr.

**75 ára føðingardagur**
Tann 6. oktober verður Steingrím Samuelsen, Sevmýri, 75 ár. Dagurin verður hildin leygardagin 7. oktober á Gistingarhúsinum í Øravík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða Steingrím við at koma, verða biðin at siga frá áðrenn 1. oktober á tlf. 371166.

**70 ára føðingardagur**
Fríggjadagin 6. oktober fyllir Svend Olsen, Rosenhøj 44, 2650 Hvidovre, 70 ár.

**60 ára føðingardagar**
8. oktober fyllir Martin Fjallstein, leiðari í Føroyahúsinum í Keypmannahavn 60 ár. Dagurin verður hildin saman innbodnum tann 6. oktober í Føroyahúsinum, Vesterbrogade 17A.

**Prógv**
Jákup í Horni hevur á Syddansk Universitet í Odense tikið prógv sum cand. scient. í biologi og kemi.

## Jóanes Norðberg 50 ár



Sunnudagin 8. oktober, verður Jóanes Norðberg í Vági 50 ár. Jóanes er sonur Ásu og Róald Norðberg í Vági. Hann er giftur við Gunnleyg, ið er dóttir Áslu og Hannis Dam í Havn. Jóanes og Gunnleyg eiga trý børn, Anniku, Eirik og Bárð.

Eftir lokna skúlagongd í Vági í 1974, fór Jóanes í læru hjá Sjúrði Strøm, og stóð hann sveinaroyndina sum maskinsmiður í 1978. Síðan fór hann á maskinskúla í Havnini og var liðugur har í 1980. Í 1981 fór hann til Danmarkar á skúla, og tók hann har víðkaða maskinmeistaraútbúgving.

Í hesum tíðarbilinum var Jóanes eisini nakrar túrar til skips við m.ø. Polarborgunum og Svalbard. Í juni í 1982 fekk hann starv hjá SEV, og hevur hann starvast har síðan tá.

Jóanes er sera dugnaligur og fittur í hondunum, og sæst hetta eisini aftur í og uttan um hús teirra og í neysti og báti. Eisini í samkomuhúsinum Bethel í Vági liggur eitt stórt og væl úr hondum greitt arbeiði eftir hann bæði innan og uttandura.

Í frítíðini er Jóanes ofta á floti í sera snøgga báti sínum.

Føðingardagurin verður hildin leygardagin hin 7. oktober, frá kl. 19.

## Søgulig løta í Betesda

Mikukvøldið 5. oktober var krúndiamantbrúdleyp í Klaksvík. Tað er rættuliga sjáldan komið fyri, at sovorðin hátíðardagur hevur verið har norðuri. Veitslan varð hildin í Betesda, og tað er neyvan komið fyri áður, at 65 ára brúdleypsdagur hevur verið hildin undir tí lonini.

Tað vóru Astrid og Jógvan Gerðalíð, sum saman við familju og vinum feiraðu, at tey høvdu verið gift í 65 ár. Tey eru kend fólk í Klaksvík og aðra staðni eisini, og tey eru framvegis virkin og løtt upp á sporið, hóast hon er 87, og hann er 90! Tí var tað ikki so undarligt, at húsið var fult.



Teimum hevur báðum dámað væl at sungið. Tí var tað ikki so undarligt, at Betesdakórið sang. Yrktir sangir vórðu sungnir, og røður og heilsanir vórðu bornar fram. Sosialurin hugdi inn á gólvið, og tá varð henda myndin tikin.

Vit heilsa krúndiamantbrúðarparinum og takka fyri okkum.

## Nikolaj Hess og Sissel Vera Pettersen konsertir í Fuglafirði og í Klaksvík

**Mentanarhúsið í Fuglafirði og Atlantis í Klaksvík verða karmur um forvitnisliga musikalsa og musiska vitjan í næstum**

KONSERT



Fuglafjørður og Klaksvík fáa forvitnisliga, musikalska og musiska vitjan í næstum. Tað er kendi danski jasspianisturin, Nikolaj Hess og navnframa norska jasssangarin, saxofonspælarin og myndlistakvinnan, Sissel Vera Pettersen, sum saman við Nikolaj Hess fara á pallin í Atlantis mánadagin tann 16. oktober kl 20:00 og í Mentanar-húsinum týsdagin tann 17. oktobur kl. 20:00.

Hesi hava spælt saman síðani 2003. Nikolaj Hess hevur verið áður í Fuglafirði, hetta var á Varmakeldu 2004, tá ið hann saman við brøðrum sínum gjørdi tónleikin til kantatuna hjá Alexandur Kristjansen – Her livir bygdin, og spældu teir eisini undir til hesa kantatu. Nikolaj undirvísir á rytmiska sangháskúlanum í Keypmannahavn og á new Scool of Musik í New York. Vilt tú hava meira at vita um Nikolaj Hess, so hevur hann heimasíðuna: www.nhess.dk

Sissel Vera Pettersen er kent navn á norska jasspallinum. Hon hevur búð í Keypmannahavn síðani ár 2000, har hon arbeiðir sum "freelance tónleikari" og sum myndlistakvinna. Sissel setir eisini tónleik til film og ballettir. Hon hevur fingið fleiri heiðursgávur t. d. "Have no fear heiðursgávuna" frá Oslu jassradio og fekk í 2004 dunaskaps heiðursgávu frá jassfagnaðinum í Trondheimi, annars hevur Sissel heimasíðuna www.sisselvera.com, har fleiri upplýsingar fáa um hennara virsksemi.

Hesir livandi tónleikarar finna saman á ljóðførum sínum í kendum poppløgum, fólkatónleiki, jassi, afrikanskum ljóðmyndum, indiskum ragas og lyriskum sálmaløgum, sum byggja upp undir eina livandi improvisitiatión, sum er verd at luta eftir.